INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Allar kommunur

22. juni 2006
Mál: 4900-004/06-1
Viðgjørt: HUS/HiH

***Kunningarskriv viðv. íløgur í virðisbrøv hjá kommunum***

Í sambandi við at fleiri kommunur og fíggjarstovnar hava vent sær til Innlendismálaráðið við fyrispurningi um hvørji virðisbrøv kommunur kunnu gera íløgur í skal Innlendismálaráðið í stuttum greiða frá hvøji lánsbrøv talan er um.

Lógargrundarlagið fyri at seta pening í lánsbrøv er ásett í § 42 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin):

*"Fíggjarnevndin skal ansa eftir, at øll peningaogn hjá kommununi er goymd á tryggan hátt.*
*Stk. 2. Peningaognir skulu setast í peningastovn, á postgiro ella í tílík lánsbrøv, ið nýtt verða, tá ið um ognir hjá ómyndingum ræður, so tær geva sum mest av sær.*
*Stk. 3. Virðisbrøv skulu hava áteknina um, at tey eru ogn hjá kommununi, og at eingin hevur ræði á teimum uttan samtykt kommunustýrisins. Um til ber, skal áteknaningin verða skrivað í bók hjá viðkomandi stovni"*

Peningaogn ella reiður peningur, sum lógliga er ásettur sbr. lóg nr. 248 af 12.04.1949 om pengesedler m.v. på Færøerne ella í formi, sum sera skjótt letir seg seta um til krónur og oyru, t.d. innistandandi í peningastovni.

Í § 1 í Anordning nr. 813 frá 2. oktober 2002 om ikrafttræden for Færøerne af lov om banker og sparekasser m.v. er eitt "pengeinstitutt" lýst sum "bank, sparekasse" ella "andelskasse". Viðurskiftini hjá hesum stovnum eru reglubundin við hesi lógini.

Peningainnskot til postverkið (postgiro) sbr. áður galdandi § 13 í løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya; er ikki longur regulerað við lóggávu.

Tá tað snýr seg um lánsbrøv, ið nýtt verða, tá ið um ognir hjá ómyndingum ræður, so tær geva sum mest av sær er sbr. kanc. skrivelse 1. august 1837[1] kunnu "de offentlige stiftelsers midler" útlænast ímóti trygd í fastari ogn ella setast í "offentlige obligationer". Við kgl. fyriskipan nr. 186 frá 12. mai 1962 eru nakrar aðrar nevndar obligatiónir komnar afturat teimum nevndu "offentlige obligationer", sum eru:

- Kreditforeningen af Kommuner i Danmark
- Kreditkassen for Husejere i København

[1] E. A. Bjørk, táverðandi sorinskrivarafulltrúi hevur í skrivi dagfestum 8. juli 1958 til løgmálaráðið neyvari lýst tann torskilda rættarstandin á økinum.

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 358080 · faks 358085 · imr@imr.fo · www.imr.fo

- Kongeriget Danmarks Tiendebank- og Hypotekbankobligationer, i de i henhold til § 3 i lov nr. 551 om lån til boligforanstaltninger af 23. december 1922 af Statsboligfonden gennem Kongeriget Danmarks Hypotekbank udstedte kasseobligationer,
- Danmarks Nationalbank i medfør af § 27 i lov nr. 116 af 7. april 1936 udstedte obligationer Kongeriget Danmarks Fiskeribank udstedte kasseobligationer
- Færøernes Realkreditinstitut udstedte statsgaranterede obligationer

Sorinskrivaraembætið upplýsir, at í roynd og veru verður allur peningur hjá ómyndingum bert placeraður í Føroya Sparikassa. Hetta er praksis, sum gongur aftur líka til avtøkuna av kgl. handlinum í 1856.

Í Danmark er rættarstøðan øðrvísi um, hvussu peningaognir hjá kommum skulu placerast. Har er ásett í § 44 í lovb. nr. 968 frá 02. desember 2003 om kommunernes styrelse, at "midler, som ikke af hensyn til de daglige forretninger skal foreligge kontant, skal indsættes i pengeinstitut eller på postgirokonto eller anbringes i sådanne obligationer og investeringsbeviser, i hvilke fondes midler kan anbringes". Reglurnar um hetta eru í bekendtgørelse nr. 367 af 11. mai 2004 om anbringelse og bestyrelse af fondes midler. Í stuttum kann sigast, at hesar reglur loyva fleiri íløgumøguleikum enn føroysku reglurnar.

Vísandi til omanfyri standandi metir Innlendsimálaráðið, at kommunur einans kunnu gera íløgur í almennar obligatiónir og í tílík lánsbrøv, hvørs útgevari er nevndur í kgl. fyriskipan nr. 186 frá 12. mai 1962.

Vegna Innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
~~deildarleiðari~~
deildarstj.